

*Petur á reinsdjóraveiðu í Grønlandi*

sveinabrævinum í hond kallar sjólívið aftur.

- Í 1955 slapp eg við koltrolaranum "Kópanesi" til Grønlands sum fýrbøtari. Rituvíkingar høvdu keypt trolaran, tá kallaðist hann "Skorðaklettur, seinni keyptu vestmenningar hann. Tað var stríggið arbeiði at vera fýrbøtari. Tú skuldi lempa kol alla tíðina. Vit gingu vakt, fýra tímar niðri í hitanum og síðan átta tímar frí. Henry Kristoffersen úr Vestmanna var skipari. Vit vóru sera óhepnir hendan túrin. Trolarin fór á land og gjørdist vrak. Vit vóru tó allir bjargaðir og komu í Føroyingahavnina. Aftan á at hava gingið nakrar dagar í Føroyingahavnini slapp eg heim við "Kallsevni" sum Andrias hjá Mortani førdi, sigur Petur Andreasen.

## Á skúla saman við Óla P.

Nú nakrast við vit løtuni, har kósin rættuliga verður sett út fyri starvsleiðina hjá Petur Andreasen. Heim aftur komin úr Grønlandi fer hann niður til Danmarkar á tekniskúla. Hann fer at ganga á Kunsthåndværkerskolen, og saman við honum er eisini Óli Petersen, sum seinni gjørdist okkara mest kendi skemtiteknari.

- Eg veit ikki rættuliga, eg lærdi at tekna reklamur, men troyttaðist av at tekna havragrýnsreklamur og árið eftir fór eg at læra til byggifrøðing.

Í 1961 var Petur liðugur sum byggifrøðingur og fekk arbeiði saman við Palla Gregoriussen, arkitekti.

- Palli arbeiddi saman við eini danskari fyritøku og hendan hevði millum annað til arbeiðis at gera býarplanlegging í Havn. Fyrsta uppgávan hjá mær var at gera eitt modell av allari Havnini. Tá var Eysturbýurin undir menning, har var lítið bygt, og vit gjørdu uppskot um hvussu hesin býarpartur skuldi skipast. Eg veit ikki, føroysku myndugleikarnir fylgdu ikki rættuliga okkara uppskotum. Her vóru privat áhugamál uppií. Vit skutu upp at talan skuldi vera um størri grundstykkir enn tey eru í dag. Men tað sótu menn við makt í býráðnum, sum áttu traðirnar sum skuldu útstykkjast, og teir vildu hava grundstykkini minni, soleiðis, at teir sjálvir fingu meira burtur úr. Tað var eitt sindur ódámligt, sigur Petur Andreasen.

Í 1964 stovnaði Petur saman við Bjarna Olsen avVálinum byggifelagið Búreising. Teir høvdu nógv at gera fyrstu árini, men seinastu í sekstiárunum vóru niðurgangstíðir og teir góvust. Tíðin var búgvin, at Petur skuldi gera sína fyrstu stóru útferð.

## Til Grønlands

Petur pakkar sekkin og stevnir móti Grønlandi. Árið er 1968. Hann hevur fingið starv á eini teknistovu hjá Tage Nielsen í Godthaab, sum høvuðsstaður Grønlands, Nuuk, varð kallaður tá.

- Tíðirnar vóru heldur ikki góðar í Grønlandi fyrst tá eg kom yvir. Hóast eg hevði sáttmála við teknistovuna, gjørdist skjótt greitt, at her var ov lítið at gera, og eg fekk starv hjá Grønlandsministeriinum í Nuuk. Eg gjørdist skrivari í bygginevndini. Tá var ongin kommunal teknisk umsiting í Nuuk, hon kom ikki fyrr enn seinni og tá fór eg eisini at starvast har. Seinni í sjeytiárunum var eitt øgiligt virksemi í Nuuk. Tað vóru 600 danskir handverkarar í arbeiði. Tað var um hetta mundi, at allir íbúðarblokkarnir vóru gjørdir, sigur Petur.

## Eitt dreymaland fyri føroyingar

- Eg leingist eftir Grønlandi hvønn dag. Tað er ringt at forklára. Tað er okkurt dragandi við hesum stórslidna landi. Tað er okkurt dragandi við kuldanum, við náttúruni við teim nógvu møguleikunum. Eg haldi Grønland er serliga gott fyri føroyingar. Her er alt sum ein føroyingur droymir um, tað er bara so nógv størri og betri pláss. Hevur tú bát, so kann tú sjálvur halda teg við mat, tú kann gera langar veiðuferðir, tú kann skjóta fugl, sigur Petur Andreasen.



*Her verða reinsdjórini flett umborð á deksbátinum sum Petur og aðrir áttu meðan hann var í Grønlandi.*

Tað var skjótt, at Petur fekk sær bát saman við góða vinmanninum Torkil Sørensen úr Havn og tá ið hann hevði frí, so var hann á fiski ella veiðuferð. Hann sigldi inn í dreymalandið, kanska ein tann mest stórslidni og vakri bletturin í øllum heiminum, inni í Godthaabsfjørðinum og her var hann saman við øðrum á longum veiðuferðum eftir reinsdjórum. Deksbáturin, teir høvdu í felag, føldi til av allari veiðuni, tá ið teir komu heim aftur.

- Hetta var ein fantastisk tíð, og eg hoyri nú, at tað eru enn fleiri reinsdjór í dag enn tað vóru í sjeytiárunum. Tað var stríggið at vera á reinsdjóraveiður. Vit gingu langt til fjals og tá vit høvdu skotið eitt djór, so vóru innvølirnir tiknir úr og djórið upp á bakið. Man var eitt sindur moyrur, tá ein kom aftur til bátin, sigur Petur Andreasen.

## Virkin í grønlendska samfelagnum

Petur kom rættuliga skjótt upp í grønlendska samfelagið. Hann gjørdist beinanvegin virkin í Føroyingarfelagnum, sum um tað mundi hevði 50 limir.

- Tað var gott samanhald í felagnum, og vit hittust ofta. Onkuntíð vóru skipsmanningar inni, tá ið samkomur vóru og tað gjørdi tiltakið eyga hugnaligt. Vit fingu mat heiman úr Føroyum og barrin og tónleikurin sjóaði fólkið saman. Tá ið Brøðrasamkoman fekk sítt egna hús í Nuuk bóru vit upp á mál samstarv. Men tað bar ikki rættuliga til, føroyingafelagið var ein verðsligur felagsskapur, meðan samkoman var ein andaligur felagsskapur. Viðurskiftini millum felagið og samkomuna vóru góð.

- Vit hildu til í Skótahúsinum og einaferð um árið sendu vit jólaheilsur heim. Hetta var ikki nakað serliga hugnaligur dagur. Hann var ógvuliga kensluborðin og ongin veislurómur. Fleiri kláraðu ikki at halda sær, men grótu meðan tey tosaðu inn á bandið. Tá var samskiftið somikið til afturs komið, at tað

*Framhald á næstu síðu*